## – trygt og ómakaleyst til hús

# Frálíkt raðhús í Hoyvík

INNI



**Vil tú búgva væl og ómakaleyst í góðum umhvørvi, so er snøgga raðhúsið í Hoyvík ein góður møguleiki.**









### Uttanfyri

Tá ið tú koyrir niðan Løgmannabreyt, snarar tú til høgru inn í Jørundargøtu og síðani til høgru. Økið er alt liðugt gjørt – snøgt og snotiligt. Við síðuna av er parkeringspláss, og nær við liggur Karlamagnusarbreyt við komandi møguleikum og tænastum. Húsini standa við blindan veg í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við góðum sólargangi og við sera góðum grannalagi har mong tilboð og møguleikar eru fyri felags virksemi. Har er sera barnavinaligt við spæliplássi og FIFA-völli nær við. Dagsstovnar, býlingshús og felags grillpláss er eisini nær við, og bilfrí gøta er millum býlingarnar og oman til skúla, kirkju, handil, bussamband m.v. Húsini eru væl atkomilig við ongum trappum, men við inngongd beinleiðis frá túninum.

### Innanfyri

Tá ið tú kemur til húsini er snøgt tún frammanfyri. Komin inn varnast tú straks, at her er talan um dygd. Her er alt gjørt út besta tilfari við besta handverki. Vindeyguni eru stór, so tú fært nógv ljós inn. Út frá bryggersinum / vaskirúminum kanst tú fara út í garðin, so tú kanst njóta útilívið á útigólvinum / terassuni. Rúmini eru snøgg og ljós, og húsini eru alt í alt sera livilig. Tað er ein fragd at seta innbúgvið inn í slíkar karmar, og tær nýtist einki stórvegis at gera. Alt er sum tað eigur at vera. Gott pláss og lætt er í ovaru hædd at innrætta alla hæddina til stovu kømur o.a. Betonveggir eru millum húsini, so lítið og einki ikki hoyrist ímillum. Húsini er sera væl hildin og viðfarin, so tey eru sum nýggj.

### Innrætting

Í miðhæddini er inngongd, køkur / stova, bryggers / vaskirúm við útgongd út í garðin, hjúnarrúm, kamar og baðirúm við brúsu. Loftshæddin er ikki innrættað, men væl ber til at fáa góð kømur. Húsini eru ser rúmlig og væl innrættað. Gólvini eru kirsubertræ parkett yvir alla hæddina, burtursæð frá gongd og baðirúmi, har flísar eru við hita.

### Fakta

- Addressa: ..........Jørundargøta 30, Hoyvík
- Byggiár: ............2000
- Hæddir: .............2
- Gólvvídd: ...........80+60=140 m²
- Grundøki: ..........225 m²
- Prísuppskot: .....kr. 1.850.000,00









PF INNI
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**